## Jeepur við skaða

Hyundai Santa Fe, 4 WD, diesel, árg. 2002, km. uml. 25.000, skrásettur sum persónbilur. Til sølu sum hann stendur við skaða. Bilurin verður seldur um hóskandi boð fæst. Minsta boð: Kr. 75.000,00.

## Ellisakfar

Mercedes 220, bensinmotor, 4 hurðar, árg. 1971, km. 167.000, nýsýnaður (ongan kross) til sølu. Prísuppskot kr. 28.000,00.

## Mercedes 190 2,6 E

6 cyl bensin, aut. gear, powerstýring, leðursetur, sóltak, fartpilot o.m.a. Km uml. 69.000, árg. 88. Bilurin er nýsýnaður (ongan kross), bremsur og dekk eru spildurnýggj. Bilurin hevur tryggingarskaða uppá uml. kr. 10.000,00. Deilir fylgja við. Bilurin verður seldur sum hann stendur fyri kr. 58.000,00. Nývirðið smb. tryggingina kr. 480.000,00.

## Ellismotorsúkkla

CZ 175 $m^2$, árg. 1976 til sølu um hóskandi boð fæst. Minsta boð kr. 10.000,00.

## Motorsúkkla

Suzuki GSF 400 Bandit, árg. 1993, km. 30.000 til sølu. Minsta boð kr. 35.000,00.

**Tlf. 44 96 13 & 21 72 00**
(yrkadagar eftir kl. 18)


## Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir lærara at undirvísa uml. 15 tímar um vikuna vegna avloypstímar.

Í Nólsoyar skúla eru 34 næmingar frá 1. til 9. flokk, so undirvísingin er samskipað við fleiri flokkum í sama bólki.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Læarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1–27.4.

Freist at lata inn skrivliga umsókn er 30. juni.

Meir fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 327033 / 327119 ella til skúlastýrið.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/ Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy
Tlf. 327017


**Hugnakvøld í Nólsoy**

**verður leygardagin 21. juni 2003**
**við mykjukapping, sólstøðubáli,**
**grillgildi og harmonikudansi**

**RITAN og NORÐLÝSIÐ sigla eykatúrar**

**Bygdarfelagið ROYNDIN, Nólsoy**

# TILBOÐ

Brandt (Blomberg) **Vaskimaskinur**



**WFF1312**
• 5,0 kg
• 1300 snúningar
• Orkuflokkur A

**Kr. 4.676,-**



**WFH1670**
• 5,5 kg
• 1600 snúningar
• Orkuflokkur A

**Kr. 7.196,-**

Sosialurin 341800

**pf Klement Petersen**
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

## Ársins keyp



Ford Mondeo 2000 TDI, árg. 2002.
Kostnaður: Einans 185.000 kr.

**Tlf. 222326**


## Blaðfólk til Eysturoyarredaktiónina

STARV sosialurin

Til at røkja spennandi, avbjóðandi og fjølbroyttar arbeiðsuppgávur verður søkt eftir blaðfólki til Sosialin.

Talan er fyrst og fremst um at røkja uppgávur á Eysturoyarredaktión okkara í Saltangará og kring alla oynna. Men tað verða eisini uppgávur á hinum redaktiónunum hjá blaðnum kring landið her serstakliga høvuðsredaktiónini á Argjum umframt á rullandi redaktiónini.

Vit hugsa okkum, at tú skal byrja eftir summarfrítíðina, helst frá 1. í august. Møguleiki verður tó eisini at byrja fyrr.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist, og at tú hevur teldukunnleika á brúkarastøði.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, sum kann gerast títt, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341800. Ella at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 23. juni. Umsóknir við viðkomandi skjølum verða at senda til:

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**100 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

Sosialurin 341800

## Rør&Blikk

**RØR & BLIKKSMIÐUR**

Søkt verður eftir rørsmiði, blikksmiði ella fólki við royndum innan HVS arbeiði, at byrja beinanvegin.

Talan er um fast arbeiði við góðari løn.

Nærri fæst at vita um starvið á:
Tlf. 322 999 far. 225 345

Rør & Blikk fæst umframt alt vanligt rør, blikk og smiðjuarbeiði, eisini við vatnviðgerðaranlegg til svimjihylar

Rør & Blikk, Undir Gráasteini 65, 100 Tórshavn,
tel 322 999 fartel 225 345
www.rorblikk.fo


**Isaksen's Bussar**
✆ 44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87




* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *

Sosialurin 341800

Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2688, P/F Føroya Kolvetni, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 12.06.2003.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hal Goldstein, c/o MHR Fund Management LLC 40 West 57th. St., 33rd Floor NY 10019 New York, USA.

*Skráseting Føroya tann 19. juni 2003*

*Kristin Balle*


Til tín yvir 50...




siri
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10

## Plast-húsaklædningur



**Viðlíkahaldsfríur**

**Rímuligir prísir**

**Á goymslu hjá:**

Sosialurin 311820

**pf Klement Petersen**
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3584
**Navn:** Sp/f ÁTS
**Adressa:** 180 Kaldbak.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 10.06.2003
**Viðtøkudato:** 10.06.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Karstin Karlsson Vang, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak.
**Stjórn:** Karstin Karlsson Vang, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka byggi- og handverksvirksemi og annað starv í hesum sambandi. Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 19. juni 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3588
**Navn:** Sp/f HJ Fisk
**Adressa:** 350 Vestmanna.
**Kommuna:** Vestmanna Kommuna
**Stovningardato:** 27.04.2003
**Viðtøkudato:** 27.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Holgar Johansen, 350 Vestamanna.
**Stjórn:** Holgar Johansen, 350 Vestamanna.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 27.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Felagsins endamál er at reka fiskivinnu o.a. í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 19. juni 2003*

*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## ALMANNASTOVAN
## lýsir eftir tveimum leiðarum

# Deildarleiðari til Stjórnarskrivstovuna

Søkt verður eftir deildarleiðara til Stjórnarskrivstovuna at byrja skjótast tilber.

Stjórnarskrivstovan hevur ábyrgdina av, at setningurin hjá Almannastovuni verður framdur í tráð við politikk og viðtøkur annars.

Deildin hevur normeraði tvey størv sum løgfrøðingar og tvey størv sum serfrøðingar.

Ein av fremstu uppgávunum hjá leiðaranum er at lýsa gongdina og broytingar á teimum økjum, ið Almannastovan umsitur, soleiðis at stovnurin kann nøkta tey krøv, sum sett verða.

Leiðarin hevur ábyrgd av at menna eina deild, sum hevur til uppgávu

- at ráðgeva og vegleiða leiðsluna í løgfrøðiligum og fyrisitingarligum spurningum
- at tryggja at lógir og kunngerðir verða umsitin á rættan hátt
- at samstarva og samskifta við Almannamálaráðið og aðrar myndugleikar
- at ummæla lógaruppskot
- at tilevna innanhýsis leiðbeinandi reglur
- at tilevna kunningartilfar til almenningin

**Førleikakrøv**
- prógv í løgfrøði ella aðra hóskandi akademiska útbúgving
- starvsroyndir frá almennari og ella privatari umsiting
- kunnleika til almannalóggávu og samfelagsviðurskifti
- góð samstarvsevni og evni at orða seg greitt í skrift og talu

# Fíggjarleiðari

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til setan skjótast tilber.

Leiðarin hevur ábyrgdina av fíggjar-, lønar- og edv-deildini. Á deildunum eru í løtuni 6 starvsfólk.

Fíggjarleiðarin skal gera metingar og framskrivingar av fíggjartørvinum á teimum økjum, ið Almannastovan umsitur, soleiðis at stovnurin kann nøkta tey krøv, sum sett verða.

**Leiðarin hevur ábyrgdina av**
- at ráðgeva og vegleiða leiðsluna í fíggjar, edv- og roknskaparspurningum
- at samstarva og samskifta við Almannamálaráðið og aðrar myndugleikar
- at gera fíggjarætlan og roknskap
- at fylgja upp og hava eftirlit við rakstrinum og teimum lógarbundnu útreiðslunum
- at ráða og vegleiða stjóran
- at gera mannagongdir á roknskaparøkinum
- at skipa hagtøl

**Førleikakrøv**
- prógv sum cand. polit, cand. oceon ella líknandi
- leiðsluroyndir/royndir innan økið
- evni til at raðfesta og tilrættisleggja arbeiði
- støðugt at kunna dagføra sína vitan innan roknskaparlógir og reglur
- góð samstarvsevni
- góðan førleika innan edv

## Fyri bæði størvini er galdandi:

**Vit bjóða:**
- starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum
- møguleika fyri persónligari og fakligari menning

**Lønar- og setanartreytir:**
**Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.**

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, á tlf. 34 64 20 millum kl. 09.00 og 16.00.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. verður at senda til

Almannastovuna
Att.: Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

í seinasta lagi 4. juli 2003 kl. 12.00.

**Um Almannastovuna**
*Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar.*
*Høvuðsuppgávan hjá Almannamiðstøðunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taja avgerðir.*
*Almannastovan hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av veitingum, fyriskipaðar eftir pensjón-, dagpeninga- og forsorgarøkinum v.m.*
*Stovnurin umsitur fyri umleið 800 mill. kr. og her arbeiða umleið 100 fólk.*
*Almannastovan hevur almannamiðstøðir í Tórshavn, Suðuroy, Eysturoy og í Norðoyggjum, og harumframt fevnir stovnurin um Hjálpartólamiðstøðina og aðrar landsdekkandi serdeildir.*